# Strandferðslan sek, men fríkend

**Væntandi broytingar í revsilógini hava elvt til eina margháttliga rættarstøðu í Føroyum. Landsstýrið situr við lyklinum til eina loysn**

HOL Í LÓGINI
*Jóanes N. Dalsgaard*

24. mei í 1999 var ein dekksmaður áhaldsin umborð á Ternuni. Hann datt niður av einum koyrirampa, meðan hann skipaði fyri á dekkinum. Maðurin fekk deyðamein av fallinum. Kanningar vóru beinanvegin gjørdar á vanlukkustaðnum. Skaðanevndin staðfesti, at trygdarviðurskiftini umborð á Ternuni vóru ikki í lagi. Høvdu trygdarforskriftirnar verið fylgdar, var væl hugsandi, at vanlukkan ikki var hend.

Tvey ár undan at vanlukkan hendi, í juli 1997, staðfesti Skipasýnið, at trygdin á bildekkinum umborð á Ternuni ikki var í lagi. Skipasýnið gav í hesum viðfangi Strandfaraskipum Landsins (SSL) boð um, at fáa trygdina í rættlag. Í august sama ár staðfesti Skipasýnið, at boðini frá juli mánaða ikki enn vóru fylgd, og gav tí av nýggjum boð um, at trygdin á bildekkinum skuldi fáast í rættlag. Tá skaðanevndin kannaði vanlukkustaðin í mei 1999 kundi hon staðfesta, at boðini frá Skipasýninum, sum vóru givin tvey ár undan vanlukkuni, framvegis ikki vóru fylgd.



*Ein vanlukka umborð á Ternuni í 1999 kostaði eitt mannalív. Hóast Strandfaraskip Landsins høvdu ábyrgdina fyri trygdini umborð, og hóast rætturin staðfesti, at SSL hevði framt lógarbrot, kundi stovnurin ikki revsast. Eitt hol í føroysku lóggávuni, sum í Danmark varð typt í 1996, var orsøkin til margháttliga dómin*

Eftir vanlukkuna bleiv ákæra reist ímóti skiparanum á Ternuni og ímóti SSL, fyri brot á lóg um skipatrygd. SSL var, sum reiðarí, ákærd fyri at trygdin umborð á Ternuni ikki var í lagi. Skiparin varð ákærdur fyri, at hava siglt, hóast skipið ikki var í forsvarligum standi, hvat trygdini viðvíkti.

Dómur fall í málinum 22. januar 2001. Føroya Rættur dømdi skiparan at gjalda 5.000 krónur í bót, umframt sakarkostnað. Men SSL bleiv fríkend. Hetta hendi, hóast Føroya Rættur staðfesti, at SSL hevði brotið lógina. Men Føroya Rættur staðfesti eisini, at SSL kundi ikki dømast, orsaka av einum holi í lógini um skipatrygd. Holið í lógini er, at revsiheimildin ikki umfatar almennar stovnar, sum t.d. SSL.

# Dagføringar í Danmark bíða í Føroyum

**Hol í lóggávuni, sum eru rættað í Danmark, verða ikki rættað í Føroyum. Landsstýrið hevur avgjørt at rættingarnar skulu bíða, til revsilógarøkið er yvirtikið**

REVSILÓGARBROYTINGAR
*Jóanes N. Dalsgaard*

Lógin um skipatrygd ("lov om skibes sikkerhed") er ein serlóg. Serlógir kunnu innihalda revsiheimildir, t.e. forskriftir fyri hvussu brot á lógina skulu revsast. Upptil miðjuna av áttatiárunum funnust eingi dømir í donsku rættarskipanini, um serlóggávu, sum heimilaði at revsa almennar stovnar. Heimild var at revsa privatpersónar, virkir, feløg o.tl., men ikki almennar stovnar. Kortini kom tað fyri, at kommunur vóru dømdar at gjalda bót. Heimildin, sum nýtt var í slíkum førum, var orðingin "eller lignende", sum var sett aftaná virkir, feløg o.s.fr.

Men í januar í 1986 ásetti hægstirættur, at orðingin "eller lignende" yvirhøvur ikki sipaði til almennar stovnar. Við dóminum hjá hægstarætti var ásett, at skuldi ein almennur stovnur kunna revsast, skuldi hetta beinleiðis vera nevnt í lóggávuni. Harvið kom áðurnevnda hol í m.a. lógina um skipatrygd, men eisini í nógvar aðrar serlógir, sum vóru orðaðar á sama hátt.

Í 1995 skrivaði Straffelovrådet, sum er ein ráðgevandi nevnd undir løgmálaráðnum, at "det er utilfredsstillende, hvis en offentlig myndighed kan overtræde lovgivningen og gå fri for straf i tilfælde, hvor en tilsvarende overtrædelse begået af en privat virksomhed ville medføre strafansvar". Straffelovrådet skýtur tí upp at gera eina áseting í revsilógini, sum ber í sær, at allir løgfrøðiligir persónar, tað verið seg almennir ella privatir, skulu kunna revsast, uttan so, at tað í lóggávuni beinleiðis er ásett nakað annað.

Fólkatingið tók tilmælið frá Straffelovrådet til eftirtektar. Í juni 1996 varð danska revsilógin broytt soleiðis, at almennir stovnar nú hava revsiábyrgd ájavnt við privatar løgfrøðiligar persónar. Landsstýrið hevur avgjørt, at broytingin ikki skal setast í gildi í Føroyum enn.

## Landsstýrið hevur ábyrgdina av órímiligari lóggávu

**Serfrøðingar mæltu í 1995 Fólkatinginum til at boyta revsilógina, soleiðis at almennir stovnar koma undir revsiábyrgd. Fólkatingið samtykti broytingina í 1996. Í Føroyum hevur landsstýrið lagt seg á málið, og hetta hevur havt margháttligar avleiðingar**

HOL Í LÓGINI
*Jóanes N. Dalsgaard*

Broytingar í donsku revsilógini koma ikki av sær sjálvum í gildið í Føroyum. Eftir ásetingum í heimastýrislógini vera broytingar í revsilógini oftast ikki settar í gildi í Føroyum, uttan so, at føroyskir myndugleikar biðja um tað. Mannagongdin í slíkum førum er tann, at danskir myndugleikar, umvegis ríkisumboðið, senda broytingarnar til føroyskar myndugleikar til ummælis. Ríkisumboðið ber broytingarnar út í Tinganes, og har verður so mett um, hvørt málið skal leggjast fyri Tingið. Verður málið lagt fyri Tingið, tekur Tingið endaliga støðu til, hvørt broytingarnar skulu setast í gildi í Føroyum ella ikki, við tillaðingum ella ikki.

Áðrenn farið verður í Tingið, kann Landsstýrið biðja um ummæli frá ymiskum myndugleikum í Føroyum, sum hava serkunnleika til ríkislógávuna, sum umræður. Í sambandi við broytingar í revsilógini er tað fútin, sum verður mettur at vera sakkunnleikin á økinum. Tíðliga á heysti 1997 sendi Løgmansskrivstovan 9 mál um broytingar í revsilógini til ummælis hjá fútanum. Ímillum tey 9 málini var ein broyting, sum javnsetti almennar stovnar við privatfólk og virkir, viðvíkjandi revsiábyrgd.

Beint fyri jól sama ár, fekk Løgmansskrivstovan ummælið frá fútanum. Um broytingina viðvíkjandi javnsettari revsiábyrgd skrivar fútin, at broytingin "kan uden ændringer sættes i kraft for Færøerne". Síðani er einki hent í málinum.

Ein avleiðing av, at Landsstýrið hevur súltað málið, er ein margháttligur dómur, sum Føroya Rættur feldi í 2001, har rætturin ikki ivaðist í at Strandfaraskip Landsins (SSL) hevði brotið lógina um skipatrygd, men kortini fríkendi stovnin fyri ákærurnar um sama lógarbrot. Ístaðin fall øll ábyrgdin fyri teirri syndarligu vanlukkuni, tá ein dekksmaður doyði umborð á Ternuni II, aftur á skiparan. Serliga løgið og órímiligt kann hetta tykjast, tá hugsað verður um, at skiparin var frítíðaravloysari, og hevði einans verið umborð í 3 dagar, tá vanlukkan hendi. Leiðslan á SSL hevði harafturímóti vita um væntandi trygdina í 1_ ár, uttan at gera nakað við tað.

Ráðgevandi nevndin hjá løgmálaráðnum, tað sonevnda Straffelovrådet, mælti í 1995 Fólkatinginum til at broyta lóggávuna soleiðis, at tað órímiliga í ábyrgdarbýtinum ímillum alment og privat varð rættað. Fólkatingið tók tilmælið frá Straffelovrådet til eftirtektar longu í 1996. Føroyskir myndugleikar hava enn ikki tikið stig til at fáa broytingina setta í gildi í Føroyum.

## Løgmansskrivstovan súltar revsilógarbroytingar

**Sambært heimastýrislógini skulu føroyskir myndugleikar spyrjast eftir, áðrenn ríkislógarbroytingar verða settar í gildið í Føroyum. Men síðani hetta landsstýrið tók við, hava ríkislógarbroytingar verið raðfestar niðarlaga. M.a. er revsilógin ikki dagførd í Føroyum síðani 1997**

REVSILÓGARBROYTINGAR
*Jóanes N. Dalsgaard*

Landsstýrið hevur ikki tikið stig til at broyta revsilógina í Føroyum síðani á heysti 1997. Men á sumri sama ár sendi Løgmansskrivstovan fútanum ein fyrispurning um "hvorvidt en række love om ændringer i straffeloven kan sættes i kraft for Færøerne". Beint fyri jól í 1997 sendi fútin Løgmansskrivstovuni svar uppá fyrispurningin. Síðani er einki hent í málinum.

Tey eru fleiri, sum undrast á, at einki meira er hent í hesum málinum. Ein teirra er Finn Ougaard varafúti.

Hann sigur við Sosialin, at hann undrast á, at arbeiði, sum fútin gjørdi í sambandi við fyrispurningin frá Løgmansskrivstovuni í 1997, ikki enn hevur verið brúkt til nakað. Finn Ougaard vísir á, at tað liggur rættiliga stórt arbeiði aftanfyri eitt tílíkt ummæli, og hann heldur tað vera løgið av Landsstýrinum at biðja um at fáa tílíkt arbeiði gjørt um tað kortini ikki skal brúkast til nakað.

Sosialurin hevur vent sær til deildarstjóran á Løgdeildini undir Løgmansskrivstovuni, Rúna Joensen, og spurt hann um, hví einki er hent í málinum. Rúni Joensen greiðir frá, at hetta eru ikki einastu málini, sum liggja á láni. Hann sigur, at heilt nógv mál um ríkislógarbroytingar liggja í Landsstýrinum, og hann vísir við hondunum, at talan er um eina stóra rúgvu. Rúni Joensen sigur, at fullveldissamráðingarnar hava ført til eina niðurprioritering av øllum málum, sum hava við ríkislóggávu at gera. Hann sigur, at andin í fullveldissamráðing-unum hevur verið, at einki skuldi gerast við ríkislógarmál.

Rúni Joensen sigur, at málini eru ikki gloymd. Hann sigur, at tá eitt mál sum hetta steðgar upp, er tað tí at onkur tekur eina avgerð um, ikki at gera meira við málið. Hvør tað er, sum hevur tikið avgerðina í hesum førinum, hevur Rúni Joensen einki greitt svar uppá.





*Høgni Hoydal landsstýrismaður í lógarmálum kennir einki til, at átroðkandi tørvur er á dagføringum av teirri føroysku revsilógini. Hann ásannar tó, at hann ikki hevur nakað yvirlit yvir, hvørji mál liggja og bíða eftir at vera avgreidd. Men hann hevur fult álit á, at embætisverkið kunnar hann, um átroðkandi mál skuldu stungið seg upp*

# Fullveldið kemur framum revsilógarbroytingar

**Hóast landsstýrismaðurin í lógarmálum ikki hevur yvirlit yvir, hvørji mál um revsilógarbroytingar liggja í landsstýrinum, er hann sannførdur um, at eingi av hesum málum eru átroðkandi**

REVSILÓGARBROYTINGAR
*Jóanes N. Dalsgaard*

Sosialurin hevur vent sær til landsstýrismannin í lógarmálum Høgna Hoydal, fyri at vita, hví sitandi Landsstýrið ikki hevur tikið stig til at dagføra revsilógina. Landsstýrismaðurin sigur, at hann ikki hevur havt nakað mál um revsilógarbroytingar á borðinum, í sínari tíð, sum landsstýrismaður.

- Tað hevur nokk sínar orsøkir í, at teir síðstu fyrispurningarnir eru komnir áðrenn eg kom út í Tinganes. Tað sum so er hent víðari er, at vit hava sent tað víðari til fútan. Og tað síðsta, sum vit hava sent, hava vit ikki fingið svar uppá enn, sigur Høgni Hoydal.

- Nú ljóðar tað á tær sum um at tað er fútin, sum tekur stig til at leggja málini fyri landsstýrið?

- Nei. Men sum eg skilji á embætismonnunum, so hava teir sent eitt bræv til fútan og spurt um broytingar í revsilóggávuni nú. Tað er sent í 2001 og er so ikki svara enn. Tað er so tann vanliga proseduran.

- Finn Ougaard varafúti sigur, at fútin hevur avgreitt sín part av málinum.

- Mannagongdin hevur verið tann at man eisini spyr fútan eftir. Tá tað kemur eitt skriv frá einum danskari ráðharrastovu so kann landsstýrið antin leggja tað fyri tingið ella lata vera. Men eingin slíkur fyrispurningur hevur verið á borðinum hjá mær hesi árini. Sum sagt, tað einasta sum eg kenni til hatta málið, tað er at ein fyrispurningur er farin víðari til fútan í 2001. At eitt skriv er komið í ‘97 havi eg ikki vita um.

- Deildarstjórin á Løgdeildini sigur, at fullveldispolitikkurin hevur ført til eina niðurprioritering av øllum málum, sum hava við ríkislóggávu at gera?

- Nei orsøkin til at málið ikki hevur verið á mínum borðið er helst tann, at tað er reist langt áðrenn eg kom í Tinganes.

### Hvør eigur revsilógina í Føroyum?

- Deildarstjórin á Løgdeildini sigur, at tað eru komnir nógvir fyrispurningar síðani tú tók við í 1998. Hann sigur, at tað liggur ein rúgva av málum um ríkislógarbroytingar í landsstýrinum, sum einki er gjørt við?

- Nei tað veit eg einki um. Og tað er ikki rætt at vit hava niðurprioritera allað ríkislóggávu. Vit hava kanska koyrt nakað nógva ríkislóggávu niðan í Tingið, hóast vit hava havt fullveldismál. Tað hava verið mál, sum hava verið átroðkandi fyri at ting skulu kunna fungera, t.d. viðvíkjandi broytingum í rættargangslógini um at man skal tosa føroyskt við dómstólarnar. Men broytingar í revsilóggávuni havi eg ikki viðgjørt á mínum borðið.

- Ein maður doyðið av vanlukku umborð á Ternuni í 1999. Føroyar rættur "fandt det bevist", at Strandferðslan hevði brotið lógina um trygd umborð á skipum. Men av tí at eitt hol var í lógini, kundi Strandferðslan ikki revsast Hvat sigur tú til tað?

- Sum sagt: eg havi ikki havt nakað slíkt mál á mínum borðið.

- Tú situr sum landsstýrismaður í lógarmálum. Hevur tú so ikki ábyrgdina fyri revsilógini í Føroyum?

- Nei tað havi eg nú ikki. Men tað er ein annar spurningur. Problemið er netupp tað, at tann sum hevur ábyrgdina av lógini ikki situr við tí til dagligt. Og teir stovnarnir, sum hava við revsilógina at gera hoyra ikki undir undir landsstýrið, men undir danska løgmálaráðið.

- Hvør er tað so, sum hevur ábyrgdina av tí føroysku útgávuni av revsilógini?

- Tað er samanumtikið heimstýrismyndugleikarnir. Tað er løgtingið og landsstýrið.

- Hevur landsstýrismaðurin í lógarmálum so ikki ábyrgdina av at revsilógin verður dagførd?

- Jú, og eg kann nevna tær tíggjutals dømir um av vit royna at fáa lóggávu dagførda, sum ikki blívur dagførd. Tað er ein generellur trupulleiki við øllum sum eitur ríkislóggáva, at tað er eitt ómetaliga tungt system at fáa fram.

- Nógv hevur verið tosað um, at danskir myndugleikar liggja á ríkislógarmálum, sum eru avgreidd úr Føroyum. Er hetta ikki eitt dømi um, at tað eru føroyskir myndugleikar, sum liggja á málunum?

- Jú tað er møguligt, eg veit ikki.

### Politikkur ella fyrisiting?

- Tú kendi ikki til málið um vanlukkuna umborð á Ternuni, sum vísti, at ein almennur stovnur kann fremja lógarbrot uttan at kunna revsast. Tá tú nú ert kunnaður um hetta málið, fert tú so at gera nakað við tað?

- Ja tað vil eg gjarna hyggja uppá, tað er klárt. Men annars havi eg ikki nakað neyvt yvirlit yvir aðrar broytingar sum eru átroðkandi, tað havi eg ikki fingið nakað at vita um.

- Hvør tekur avgerð um, hvørji mál koma á borðið?

- Har er tað vanliga soleiðis, at antin biðja vit sjálvir um broytingar, tí vit eru gjørdir varugir við tað antin av teimum, sum eru brúkarar ella av teimum sum eru viðgerðarar av hesum málsøkjum, sum eru donsk. So koma tað eisini skriv frá donskum myndugleikum, har spurt verður, hvørt broytingar, sum eru framdar í Danmark, eisini skulu setast í gildið í Føroyum. So vurderar man um broytingarnar skulu setast í gildi sum tær eru, ella við ávísum broytingum tillagaðar til føroysk viðurskifti. Tað er tann vanliga mannagongdin.

- Og ummælið frá fútanum er eitt skjal úr hesari mannagongdini. Men mannagongdin er steðga upp aftaná at fútin hevur givið sítt ummæli.

- Tað er ikki tikin nøkur politisk avgerð um, at málið ikki skal fram.

- Er tað embætisverkið, sum hevur avgjørt, at einki meira skal gerast við málið?

- Ja, ella tað hevur verið prioritera lægri enn onnur mál, sum eru broytt.

- So tú sigur við øðrum orðum, at tað er embætisverkið, sum stendur fyri prioriteringini?

- Nei, ikki um tað kemur eitt skriv beinleiðis á mítt borð. So hevði eg avgjørt um tað skuldi fara víðari ella ikki. Men revsilógina hava vit prioritera rættiliga niðarlaga, tí vit hava jú sagt at vit skulu hava eina føroyska revsilóg, sigur landsstýrismaðurin í lógarmálum.

Høgni Hoydal sigur at enda við Sosialin, at nú hann hevur fingið kunnleika til holið í revsilógini, fer hann at royna at fyrireikað málið, soleiðis at eitt uppskot til ríkislógartilmæli kann leggjast fyri Tingið eftir valið.